

# Nú kanst tú kløkka tey í Bø

Fólk í Bø fingu sjáldan óvæntaða vitjan. Tey vóru næstan ongantíð tikin á bóli av vinfólkum, sum búðu aðrastaðni enn í Vágum. Komu avoyggjarfólk endiliga á gátt, so var tað fyrireikað og fráboðað í góðari tíð. Eitt sindur óføroyskt kanska. Men tað er tíbetur fortíð. Við Vágatunlinum er tað vorðið skjótari og lættari at koma um Vestmannasund. Tað tekur bara nakrar minuttir. Við Vágatunlinum er koyrandi millum triggjar tær størstu oyggjarnar í Føroyum, har 75 prosent av fólkinum býr.

Nú er lagamanni at kløkka fólk í Bø. Og bíggjarfólk og vágafólk annars kunnu vænta sær óvæntaða vitjan.

## Minst til Kubban



Ferðast tú ofta um Vestmannasund, loysir tað seg at tekna hald, tí tá fært tú 40 % í avsláttri. Tú fært ein kubba at seta í forrútin og kanst koyra igjøgnum uttan at gjalda hvørja ferð. Hald kann teknast á www.vagatunnilin.fo, ella við tekningarskjali sum fæst á posthúsunum kring landið.

## Prísir

| | | Prísur ① | 5 klipp ② | 20 klipp ③ |
|---|---|---|---|---|
| Akfør | undir 6 m | 188,- | 150,- | 112,- |
| Akfør | 6 - 12,5 m | 918,- | 734,- | 550,- |
| Akfør | yvir 12,5 m | 1.378,- | 1.102,- | 826,- |
| Ferðafólk/ motorsúkklur/ | | ókeypis | | |

① er prísurin fyri ein túr (báðar vegir) uttan hald
② ③ er prísurin fyri ein túr (báðar vegir), um tú teknar teg fyri haldi við 5 (tú sparir 20%) ella 20 túrum (tú sparir 40%).

Gevið gætur prísurin er fyri báðar vegir (fram og aftur)

Depositum fyri kubban: 300,-

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin p/f. · Skansavegur 7 · P.O. Box 1010 · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 350 200 · Fax +298 350 201
www.vagatunnilin.fo




# Alarmcentralurin ótryggur





**Venjing í undirsjóvartunlinum sunnukvøldið vísti, at tað gongur ov illa at fáa boð frá alarmcentralinum í Havn til sløkkiliðini í Vágum**

VENJING

*Orð: Edvard Joensen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Vágatunnilin:** Tað gongur ov illa hjá vágamonnum at fáa boð frá alarmcentralinum í Havn, tá eitthvørt hendir, sum krevur fólk frá sløkkiliðunum í Vágum.

Sunnukvøldið var ein sløkkiliðsvenjing hildin í Vágatunlinum. Venjingin gekk eftir bókini, uttan tað, at parturin hjá alarmcentralinum var ikki optimalur, sigur Dagfinn Petersen, brandmeistari í Miðvági og Sandavági.

Tað eru sløkkiliðini í Miðvági- Sandavági og í Kvívík, sum hava ábyrgd av Vágatunlinum, tí tunnilin kemur upp í Kvívíkar- og Sandavágs Kommunu.

Dagfinn Petersen sigur, at hann veit ikki rættiliga, hvat tað er, sum er galið. Men tað er okkurt við at fáa boðini víðari frá alarmcentralinum út til avvarðandi í Vágum. Eisini í Vestmanna eru trupulleikar við at fáa boð frá alarmcentralinum.

Sami trupulleikin hevur verið í Kvívík, men har er líkt til, at hann er loystur. Brandmeistari í Miðvági-Sandavági heldur, at tað var eitthvørt, sum Føroya Tele gjørði onkustðani, sum loysti tann trupulleikan.

– So tað átti at kunnað latið seg gjørt her hjá okkum eisini. Tí tá tað er í lagi, riggar tilbúgvingin eftir øllum at døma fínt vísir hann á.





## Televarpspakkin

SVF verður lagt á sendinetið uttan gjald. Haldarin rindar lógarásett gjald beinleiðis til Sjónvarp Føroya.

*Hesar rásir skiftast um at senda (Timeshare)

Mánaðargjald fyri Televarpspakkan, við 20 rásum **179,-**

## Canal+ pakkin

Pakkin verður veittur sum eitt ískoyti til Televarpspakkan

CANAL+ · CANAL+ ZAP · CANAL+ GUL · CANAL+ BLÅ

Mánaðargjald fyri canal+ pakkan **219,-**

## MUtv pakkin

Pakkin verður veittur sum eitt ískoyti til Televarpspakkan

Mánaðargjald fyri MUtv pa[redacted] **59,-**

**Samráðingar eru við [redacted] um**

**Rásirnar verða vænta[redacted]**

**Force móttakarin**
Force er millum mest framkomnu móttakarar á marknaðinum. Televarpið og Focus-verksmiðjan hava í tættum samstarvi ment móttakaran til føroysk viðurskifti. Vit kunnu tí bjóða móttakarar fyri ein serliga lágan kostnað.
Til Televarpshaldið er eitt haldarakort, ið skal setast í móttakaran. Fyri leigu av haldarakorti verður goldið 150,- í hálvárligum gjaldi.
Force móttakarin er sera einfaldur at brúka. Tú tendrar, setir kortið í, velur rás og hyggur.



Vegl. prísur **2195,-**

## Her fæst Televarp

**Damor** á Argjum
**Delta Elektronikktænastan** í Gongini
**LM Handilin** við Hoyviksvegin
**Radiohandilin** í N.Finsensgøtu
**Teledepilin** í miðbýnum